UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 8. apríl 2022
J.nr.: 22/05344-4

# Reglugerð
# fyri
# stuðulsjáttan til verkætlanir innan orkumøguleikar úr undirgrundini

## Endamál

**§ 1.** Reglugerðin ásetur treytir fyri nýtslu av játtan á konto 6.37.4.07. Orkumál.

*Stk. 2.* Endamálið við stuðulsjáttanini er, at Jarðfeingi og/ella Umhvørvisstovan (Orka) kunnu fremja verkætlanir saman við kommunum, felagsskapum og/ella privatum feløgum til tess at útvega nýggja vitan um orkumøguleikar úr undirgrundini, t.d. flógvar keldur og djúpboringar.

*Stk. 3.* Játtanin kann verða nýtt til verkætlanir innan orkumøguleikar úr undirgrundini.

## Umsiting

**§ 2.** Umhvørvis- og vinnumálaráðið umsitur játtanina og játtar pening til verkætlanir, sum Jarðfeingi og/ella Umhvørvisstovan fara undir. Umhvørvis- og vinnumálaráðið tryggjar, at verkætlanin er í samsvari við hesa reglugerð.

*Stk. 2.* Umhvørvis- og vinnumálaráðið kann leggja umsitingina til annan stovn at umsita eftir hesi reglugerð og árligu løgtingsfíggjarlógini, konta 6.37.4.07. Orkumál.

## Stuðulstreytir

**§ 3.** Jarðfeingi og/ella Umhvørvisstovan kunnu fremja verkætlanir saman við kommunum, felagsskapum og privatum feløgum.

*Stk. 2.* Verður verkætlanin framd saman við kommunum, felagsskapum og privatum feløgum, rindar landið í mesta lagi 50% av samlaða verkætlanarkostnaðinum.

*Stk. 3.* Jarðfeingi og/ella Umhvørvisstovan senda Umhvørvis- og vinnumálaráðnum skrivliga umsókn um stuðul til verkætlan. Umsóknin skal fevna um:

a. lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
b. greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við stuðulsjáttanini,
c. lýsing av luttakarunum og
d. arbeiðs-, tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

*stk. 4.* Jarðfeingi og Umhvørvisstovan skulu lata frágreiðing til Umhvørvis- og vinnumálaráðið. Umhvørvis- og vinnumálaráðið ásetur í játtanarskrivinum í hvørjum líki, frágreiðingin skal latast og nær.

*Stk. 5.* Metir Umhvørvis- og vinnumálaráðið at tørvur er á eini ávegis frágreiðing, skal henda latast Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uttan drál.

**Umsókn**

§ 4. Umsóknir skulu latast Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Lýst verður, við freist, eftir umsóknum á heimasíðuni hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum www.uvmr.fo.

*Stk. 2.* Umsóknir verða viðgjørdar saman við umboðum á Jarðfeingi og Umhvørvisstovuni sum hava førleikar og servitan innan økið.

**Útgjald**

**§ 5.** Stuðulin verður útgoldin tá Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur móttikið verkætlanarroknskap.

*Stk. 2.* Útgjald kann eisini verða goldið fyri ávegis verkætlanarroknskapir.

*Stk. 3.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

**Gildiskoma**

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 8. apríl 2022

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen
aðalstjóri